Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jørgen Niclasen, løgtingsmaður

Svarari: Árni Skaale, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Veðurstøðirnar í Mykinesi, í Fugloy og á Eiði

Spurningar:

1. Nær fara veðurstøðirnar í Mykinesi, í Fugloy og á Eiði at virka aftur?

Viðmerkingar:
Vit hava vindmátarar á rættiliga nógvum vegastrekkjum. Útvarpið varpar hendan vind, so bilførarar vita, hvat teir koma til, ella lata verða við at koma til.

Vit hava eisini fimm vindmátarar, sum hava stóran týding fyri øll siglandi. Vindmátararnir standa á okkara ytstu punktum. Teir eru á Akrabergi, á Borðuni, í Mykineshólmi, á Eiði og í Fugloy.

Veðrið í Føroyum er merkiligt, ikki tað sama nakrastaðni. Serliga fyri útróðrarfólk og onnur siglandi hevur vindupplýsing stóran týdning. Vindur á nevndu útplássum samsvarar slett ikki við vindin á fastlandinum.

Í longri tíð hava 3 av nevndu 5 vindmátarum ikki virkað. Tað hevur givið onkrum trupulleikar. Serliga tí at heimasíðan upplýsti eisini vindin á teimum støðum, har vindmátarin ikki virkaði. T.v.s. at tá tú opnaði síðuna, so var vindurin tann, sum Tórshavn vísti. Trýsti tú so á Mykines, ja so var sami vindur har. Men tað var ikki rætt, tí hetta var vindurin í Havn. Dømi er um, at vindmátarin í Mykineshólmi vísti 7 m/s, men vindurin var 17 m/s.

Eftir samrøðu herfyri millum spyrjaran og landsstýrismannin gekk ikki long tíð, til heimasíðan var rættað. Nú sæst, at eingin vindmáting er í Mykinesi, í Fugloy og á Eiði. Helst eru hesar veðurstøðir sera stór trygd fyri øll, sum sigla, og eisini avgerandi fyri trygdina hjá útróðrarfólki.

Tí verður spurt, um landsstýrismaðurin kann tryggja, at hesar veðurstøðir aftur fara at virka, og um so er, nær verður tað?

Á Løgtingi, 15. august 2022

Jørgen Niclasen